DAGBÓK

Leygardagur 17. februar

18. febr.: Sexagesima. Mánin næstur jørðini.

21. febr.: Seinna kvarter. Sólarris kl. 8,00 og sólsetur kl. 17.23.

22. febr.: Pætursmessa (Pæturs stólur). Fyrsti várdagur (várvinnutíð).

24. febr.: Leypársmessa.

Vit eru í 20. viku á vetri

KALORIUR

Nú á døgum verður so javnan talað og skrivað um kaloriur. Á okkara leiðum verð ur aloftast talað um, at vit fáa ov mikið av kalorium, gerast ovurfeit — ja, doyggja av berari fiti. — Onkur sigur, at flestu sjálvmorðini verða framd við gafli og knívi. — Verri er vorðið aðrastaðni, ti minst teir tveir triðingarnir av mannættini fáa ov lítið, ja, mong, so nógv ov lítið av kalorium. Har verður ofta hungur og háll, livilíkindini vánalig og livialdurin sera stuttur. Býtið er ójavnt, tað er stórur munur millum tey, ið hava tað best — fáa flestar kaloriur — og tey, ið hava tað ringast — fáa minst av kalorium. Vit skulu her nevna tey londini, har fólk fáa flestar kaloriur dagliga:

1. New Zealand	3.410
2. Danmark	3.330
3. Bretland	3.260
4. Ísland	3.230
5. Sveits	3.160
6. Australia	3.160
7. USA	3.140
8. Turkaland	3.110
9. Kanada	3.090

BRÆV ÚR KASSIN

Brævkassin.

Hetta er kanska heldur enn ikki eymur spurningur; men hóast alt loyvi eg mær at spyrja, um brævkassi blaðsins kann siga so mikið: hvønn veg hellur nýggi danski statsministarin, vinstavegin ella høgravegin?

Forvitin.

SVAR: Tað er vist einki loyndarmál, at Hilmar Baunsgaard, forsætismálaráðharri, telist millum teir høgrasinnaðu í radikala flokkinum, meðan menn, sum Karl Skytte og fleiri av teimum nýggju tinglimunum eru meira vinstrasinnaðir og hella meira móti javnaðarmonnum enn at teimum borgarligu longst til høgru.

VÆL SAGT

Um ein verður óvinur við ein professara, verður ein vinur við tveir aðrar! (Jhon Takman)

Lat okkum gera tað fyri komandi ættarlið, sum vit skuldseta farna ættarlið ikki at hava gjørt fyri okk um!

Ein hevur ongatíð hitt ein mann, sum ein ikki hevur kunna lært okk urt av!

WEEK-END

M Fólkaflokks kvalifikatiónir
O Tað ei meira eru kvalifikatiónir
L um hann er vísur, hon er klók,
A nú ræður bert um í Dimun
R at hava lopið rók av rók!

SJÓVINNA

Veiðan øktist 13.000 tons

Føroyska fiskiveiðan hevur verið alsamt vaksandi hesi seinri árini. Hetta kemur sum rímuligt er fyri ein part av ti økta fiskiveiðiflotanum, sum tó eisini hevur verið fyri afturstigum — eitt nú í 1965 og 1966.



Samlaða fiskiveiðan — óreinsaður fiskur — var í fjør umleið 178.000 tons. Hetta er ein framgongd uppá 13.000 tons í mun til 1966. Framgongdin er fyrst og fremst orsakað av økingini av sildaveiðuni, nú kraftblokkurin og ringnótin hava verið brúkt meira enn áður. Toskaveiðan var fyri fyrstu ferð í fleiri ár í afturgongd.

Samlaða veiðan fyri nøkur ár 1956—1967 var hendan: (1.000 tons)

	síld	Annar fiskur	Í alt
1956	23,7	92,6	116,3
1958	17,7	89,1	106,8
1960	11,0	98,0	109,0
1962	9,8	133,7	143,5
1965	19,3	119,9	139,1
1966	61,6	103,8	165,4
1967	71,5	107,1	178,6

Smáskemt



— Kom og hygg at dvørginum, ein sensatión.

— Hatta er eingin dvørgur. Hann er sum eitt normalt menniskja.

— Ja, tað er sensatión — hann er heimsins størsti dvørgur.

BAÐ ÚT

* er tað makaleyst av fólka-
* flokksmonnum at skuldseta
* aðrar fyri at reka fólk út í ar-
* beiðsloysi, tá upp í 80 pst. av
* organiseraðum arbeiðarum gin-
* gu arbeiðsleysir, meðan teir
* sjálvir sótu til róðurs — og
* hetta samstundis sum teir seldu
* skipini úr hondunum á fiski-
* monnum.

Góð ráð


KÓKA FISK



Fiskurin verður fastari og hvítari, um ein dryppar eitt sindur av sitrónsaft í løgin, meðan kókað verður.


LOYNDARORÐ

Finn røttu ordini niðureftir. Á aðru og fjórðu reglu fært tú tvey landanøvn.



1) mannsnavn 2) sigra 3) eins stavir 4) gimsteinur 5) illar 6) steinur 7) avreiða.

Krossorð:



Yvir: 1) djórið 7) rustur 8) friður 10) einki 11) orkestur 14) karakterur 15) tóni 16) kost 18) fuglar.
Niður: 2) ikki 3) smalar 4) net 5) roytir 6) planta 9) seyður 12) ílæt 13) stykkjamál 17) fornavn.

5 spurningar

1) Hvørji lond nevndust sentralmaktirnar í 1. heimsbardaga?
2) Hvat merkir irrationelt?
3) Hvussu eitur kenda blaðgøtan í London?
4) Hvørjum landi liggur býurin Chablis?
5) Hvat er mótvegis generel?

SVAR: Týskland, Eysturtriki-Ungarn, Bulgaria og Turkiið 2) skilagarn, 3) Fleet Street 4) Frankariki 5) sersklit.

VÍSIND

TEKNIKKURIN HEVUR GJØRT OVURSTÓR FRAMSTIG SEINASTU ÁRINI; MEN GRUNDSTØÐIÐ ER Í MONGUM FØRUM LAGT LANGT AFTURI Í TÍÐINI

Lítið 100 ára minni

Bindimaskinan — bæði hon, ið virkar í teimum ymisku heimunum, og hon, ið virkar á teimum stóru verksmiðjunum — er rættuliga gomul.

Heiðurin fyri uppfinningina av sokallaðu flatbindimaskinuni, sum vit kenna hana í dag, eigur bretin William Cotton (1819-87). Tað var William Cotton, sum saman við Altenbourough í 1868 gjørdi hina fyrstu mekanisku flatbindimaskinuna, og hon kom at bera navn hansara: Cotton-maskinan.

Maskinan var serstakliga brúkt til at gera damusokkar við, og maskinan á okkara døgum kann binda uppi 36 pør samstundis við í alt umleið 1 miljón eygum um minuttin.

Cotton-maskinan verður eisini brúkt til at framleiða fult fashioneraðar bundnar vørur við, sum serstakliga hava vunnið væl fram seinri tíðina.

Veitst tú

AT amerikanskar og týskar kanningar vísa, at tær flestu bilvanlukkurnar ikki fara fram, tá ferðin er mest ella minst. Undir meðalferð henda flestu vanlukkur .

AT amerikumaðurin Herman Budgett, sum herjaði í Chicago í 1890-árunum, setti hina meira óhugnaligu heimsrekordina at drepa 150 menniskju — hann endaði í gálganum.

AT kanningar í USA vísa, at børn í dag dáma væl betur at ganga í skúla, enn børnini gjørdu tað bara fyri 15—20 árum síðan.

AT kolibriin — heimsins minsti fuglur — er ógvuliga kvik at starta. Hon kann gera seg leysan frá eini grein uppá 7/100 sekund.

AT bara ein einsamallur diamantur av 500, ið funnir verða, er so uttan brek, at hann kann brúkast til dýrmett pynt.

AT grísar eru meira kræsnir í mati enn bæði hestar, neyt, geitir og seyður.

AT kamelar kunnu goyma vatn til triggja daga brúk á ferðum í oyðumørkunum.


Rímsmiðjan

RENTAN

So skjótt teir fólkaflokksku banka- og sparikassastjórarnir høvdu sent rentuna upp, legðist Hákun Djurhuss á javnaðarmenn og skuldsetti teir fyri hesa ómildu gerð og lovaði at syrgja fyri at fáa rentuna niðuraftur.

Tá ið Rasmus Olsen, stjóri banka OKKARA og Hansi J. har norðuri, (sum tíðum skiftir fiokkar) stjóri sparikassa norðinga og við teim úr fólkaflokki fleiri í kassar vilja hava av rentum rikiliga meiri, egnir Hákun Djurhuus og teimum inniliga takkar. Føroyingar! tit veljið meg, so rentan aftur lækkar!

TRÍKANTURIN



1 = hjáljóð
2 = friður
3 = í berginum
4 = aktaðu
5 = fuglur



— Tá eg havi hoyrt allar valtalurnar, og alt tað, flokkarnir vilja gera, ynski eg altið, at landsstýrið má vera skipað av øllum flokkum!

* * *

Hanna: Vekir maður tín teg, um hann ikki svevur um næturnar?
Anana: Nei, hann er so góður við meg, at eg eri vís í, at hann ikki hevði vakt meg, sjálvt um eldur hevði verið í húsunum.

* * *

Menniskjan er ein teknisk betri útgáva av apunaum. Tað er nóg mikið hjá henni at brúka albogarnar at svinga seg upp!

* * *

Hanna: Hvussu gekst við slankikurinum hjá manni tínum?
Sanna: Á, tig, á tig, fyrstu vikuna misti hann 2 pund, aðru vikuna misti hann 3 pund og triðju vikuna misti hann buksurnar.

* * *

Ein optimistur er hann, ið hevur hoyrt oll vallyftini. Ein pessimistur er hann, ið hevur hoyrt tey einaferð fyrr!

